# Ósjónligur maður bjargaði útróðrarbáti

*Eftir Jústinus Leivsson Eidesgaard*

"Tað var hann sum rópti, tað var Jesus, eg veit tað, tí eg havi hoyrt røddina aftur seinni í lívinum, og tá var so púrasta ongin ivi. Ein maður rópti á meg úr maskinrúminum á Glottanum, meðan vit lógu í briminum norðantil á Viðoynni við motorstoppi. Har var ongin maður, men luft var komin aftur í tangarnar, nóg mikið til at seta motorin í gongd aftur, her hendið eitt undur, sum hevur fylgt mær við einum smíli seinastu 46 árini, sigur 65 ára gamli Símun Hans Jacobsen av Hellunum, ættaður av Syrðadali á Kallsoynni.

Summi trúgva alt lívið á forsjónina uttan at hoyra tað minsta, síggja tað minsta ella droyma tað minsta og tey skulu vera sælari sambært halgu bók. Onnur fáa boð og klokkurein tekin frá máttum uttan fyri lívið, týdningarmikið boð, boð sum kunnu merkja lív ella deyða. Fleiri av teimum, sum lesa hesa greinina, trúgva als ikki upp á slíkt yvirnáttúrligt sum boð frá ósjónligum fólkum. Tá fólk ikki trúðu, spurdi ein kendur skipari, Hans Pauli í Hvannasundi, sáli, mangan: "Íðan var tú hjástaddur, tá tað hendi! Eeeg var"

Símun Hans sær hendingina fyri sær. Teir eru á veg heim aftur av útróðri. Motorurin er steðgaður, teir reka inn móti Viðoynni, tað er óslætt. Nú er bara brimið millum teir og høga bergið. Teir koma neyvan livandi frá hendingini, hendir ikki okkurt ógvusligt, og tað var júst tað sum hendi.

Símun Hans er kallsoyingum, sonur Ingeborg og Petur Juul Jacobsen. Hann býr á Hellunum og hann sær Kallsoynna hvønn dag, tó bara vestaru síðuna, sólsíðuna, og hendingin hann greiðir frá í dag hendi langt áðrenn hann visti nakað av týdningi um Hellurnar, bygdin sum seinni skuldi gerast karmurin um lívið og heimið og alt sum lívið fevnir. Símun Hans hevur verið sveisari seinastu mongu árini. Hann veit alt um slaggu, elektrodir, vánaligt stál og gott stál. Hann kennir til rust og ótespiligt arbeiði í ruskveðri umborð á útslitnum fiskiskipum, sum mødd av veiðu eru komin á skipasmiðju til heilsubótar. Hann hevur arbeitt á Skála Skipasmiðju síðan 1978 og undan tí hevur hann stríðst sum útróðrarmaður og við skipum, ein stóran part av tíðini sum motorpassari. Hendingin í 1957 hevur fylgt nógv í lívinum hjá Símun Hans og seinastu árini hevur hann havt sovornan hug at siga hesa søgu víðari til onnur, onnur tey nærmastu. Eg eri útvaldur at vera boðberi, hugsar hann. Hann hevur gjørt seg til fleiri ferðir hetta seinasta árið og eg havi merkt, at hann hevur okkurt stórt upp á hjarta. Nú hevur hann endiliga tikið seg saman. Hann situr í stovuni her á Hellunum. Her er heitt, í ovninum brennir eingilskt kol og vindurin knakar í gomlu bitunum. Vit eru aftur í 1957, sama ár eg sjálvur var føddur. Eg dugi ikki sjálvur at ímynda mær hvussu drúgv 46 ár eru, minnist bara frá tí eg var fýra. Símun Hans var 18 ára gamal, og ein leitandi sál tá undrið hendi..



*Sæl eru tey sum einki tekin fáa og allíkavæl síggja. Leysliga eftir Halgu Bók. Hjá summum skal meira til. Símun Hans hevur verið vælsignaður við beinleiðis boðum frá forsjónini. Her er hann avmyndaður við komfýrin í fyrstu bygdu húsunum á Hellunum*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

## Eingilskmenn lógu inni

– Hendingin fór fram millum 10-12 desember. Vit vóru farnir inn til Klaksvíkar sum vanligt sunnukvøld. Símun Joensen í Miðstovuni á Syðradali førdi Glottan og vit vóru fleiri manns úr bygdini við. Vit plagdu búgva umborð og fór ikki til hús fyrr enn leygarkvøld og síðan inn aftur til Klaksvíkar sunnukvøld. Hesa vikuna høvdu vit verið úti mánadag og týsdag, men mikudagin var so ringt veður, at vit fóru ongan veg. Út á mikudagin fingu vit boð um at egna. Símin segði, at í kvøld fóru vit út. Nógvir eingilskmenn lógu inni, so friðaligt fór at vera á Norðhavinum. Vit engdu 42 stampar og fóru avstað norður gjøgnum Haraldsund. Símun ætlaði at seta í einum lodskoti norður úr Viðoynni, sigur Símun Hans.

– Vit koma á ætlaða staðið og settu. Eg minnist, at eg hevði boyðuvakt hesa náttina og hinir tørnaðu inn. Vit mundu fáa 150 pund upp á stampin og tá vit vóru lidnir at draga tørnaði eg inn, sigur hann.

## Vaknaði í kvirru

– Nú vakni eg og skilji ikki rættuliga hví tað er so kvirt umborð. Her er ongin motorur at hoyra og eg fekk tað ikki rættuliga at passa, at vit vóru komnir til Klaksvíkar longu. Her var okkurt áfatt. Eg fór upp og so var. Vit lógu við maskinstoppi og vit vóru komnir inn í munnan í Haraldsundi.

– Eg minnist, at skiparin Símun kemur úr maskinrúminum og sigur. Eg fái ikki motorin í gongd, her er ongin luft eftir ella í hvussu er ov lítil luft eftir. Ternan og Viðoyggin vóru hjálparskip um hetta mundi, vit kallaðu á bæði skipini, men tey kundu ikki koma, tí at tey hjálptu øðrum bátum, sigur Símun Hans.

– Hóast eg var ungur, so kendi eg eitt sindur til motorar, hevði verið niðri og hugt, tá maskinmeistarin arbeiddi. Eg fór niður, tørnaði motorinum og setti luft til. Har hoyrdist bara eitt lítið fís, og síðan var alt deytt aftur. Onnur fløskan var heilt tóm. Í hinari vóru 5 kilo, tað sást á vísaranum. Tað skuldu 15 kilo til at fáa hann í gongd, tá hann var heitur og 22 kilo, tá hann var kaldur.

Teir eru farnir at rigga til at flota redningsbátin á dekkinum Hetta var ein træbátur við galvi aftan, men tað gekk ikki so lætt, tí hann var fyri tað fyrsta tungur og síða fullur av øllum órúmi, grýtum og øðrum.

– Dia bróður rópar niður til mín og biður meg um at koma og hjálpa til. Og nú hendir eitt undur, tá eg líti aftur á. Tað var líka sum tað bleiv heilt stilt og eg kendi at samband var millum meg og himmalin. Eg fari upp gjøgnum leytarin sum gekk upp í stýrhúsið og skal út at hjálpa teimum. Framvegis er sama tøgnin, tað er líka sum alt ljóð av dekkinum er burtur. Meðan eg standi í leytaranum hoyrist ein rødd rópa úr maskinrúminum: "Símun Hans" ja, hon rópti mítt navn. Og har var ongin í maskinrúminum. Tað reistist hvørt hár á høvdinum á mær. sigur Símun Hans.

– Eg fari niður aftur í maskinrúmið. Eg var rættuliga illa heitin. Eg minnist eg vendi mær móti luftfløskunum, foldaði hendurnar, og bað faðir vár. Eg bað til Gud um at fáa motorin í gongd aftur. Dia bróður var nú aftur í lúkuni og rópti á meg, segði at vit vóru í briminum vit vóru riknir eystur móti norðendanum á Viðoynni, norðanfyri Fiskimúla, sigur hann.

– Eg fór ikki upp, eg hevði biðið til Gud og tí fór eg til motorin, tørnaði hann, snaraði regulatorin hálvan triðja umdrejning upp. So fari eg til luftfløskuna, hoyri at har er luft í, tá eg skrúvi ventin á fløskuni frá, hoyri hvussu luftin setir frá fløskuni og inn móti motorinum. Eg opni kúlvin, tað er ein ventilur á motorinum og luftin sleppur inn. Háli í startventilin og motorurin fer í gongd. Har vóru 22 kilo í tá eg startaði og stutt framman undan vóru bara fimm. Eg skuldi til at pumpa luft, men teir bóðu meg bíða, til vit vóru komnir leysir av landi.

– Tá vit vóru komnir á Klaksvík sigur Dánjal í Hoygarðinum á Syðradali við meg. Hann var við. Hatta var eitt ordiligt bragd tú gjørdi. Eg segði honum, at tað var ikki mær at takka fyri, men eini hægri makt.

## Byrjanin til umvendilsi

Símun Hans er vísur í at hendan hendingin var byrjanin til hansara umvendilsi. Sum ungur hevði hann livað sum hinir ungu í bygdini, hann smakkaði sær eisini á í vertsskapi, uttan at hetta var ein stórur trupulleiki. Men hann var ikki nøgdur og kendi ikki frið.

Hann hevði møtt hellugentuni Sonju, sum var arbeiðsgenta heima hjá foreldrunum hjá honum og tey vóru nýgift um hetta mundi, tá seinasti ivin í trúarsakum varð fingin upp á pláss. Hetta var í januar 1960. Hann sigldi sum motorpassari við útróðrarbátinum Mækjuvík hjá Kjølbro. Hann var farin á Hellurnar at vitja konuna. Tey høvdu ikki bygt um hetta mundi. Hann hevði fingið eyga á eina byggigrund á Hellunum og var farin at hyggja eftir henni hetta kvøldið.

– Meðan eg standi og hyggi eftir grundini hoyri eg eina rødd, sum segði orðarætt soleiðis við meg: "Eg doyði fyri teg á Golgata og kvittaði tínar syndir." Hetta var sama rødd sum eg hoyrdi í maskinrúminum trý ár framman undan. Nú kendi eg vissuna og hon hevur fylgt mær síðan. Eg havi onkuntíð síðan hoyrt og fingið varskó, men ongantíð so týðuliga sum hesar báðar ferðir. Eg sá einki, bara hoyrdi. Eg gjørdist ótrúliga glaður, tá eg hoyrdi Jesus fyri aðru ferð á Hellunum, tá reistist einki hár, eg visti hvør hann var og takkaði honum, sigur Símun Hans Jacobsen.



# Fólkaræðið – fólkavald umboð

TINGHELLAN

*Beinta í Jákupsstovu*

Okkara fólkaræði er bygt á fólkavald umboð. Til ber at hugsa sær skipanir, har øll taka lut í stýringini av samfelagnum, sum í gamla Aten. Almenn semja man kortini vera um at halda okkum til eina skipan, har nøkur verða vald burtur úr at umboða fjøldina á tingi. Ósemjurnar snúgva seg um, hvussu útveljingin skal fara fram, hvussu valskipanin skal vera: Hvussu skulu Løgting, bý- og bygdaráð mannast? Eg skal her í stuttum vísa á nakrar teoretiskar útgreiningar og nøkur empirisk dømi frá valgransking.

Vanligt er at skilja millum politiska umboðan sum antin *actual* ella *virtual*. Actual merkir, at tann fólkavaldi er beinleiðis umboð fyri ein bólk. Tað kann t.d. vera ein bóndi frá einari útoyggj, ella ein, sum situr í rullistóli, sum verður valdur til at vera talsmaður fyri sín bólk. Við hvørt verður sagt, at ting skulu vera *spegilsmyndir* av samfelagnum. Spurningurin verður tá, hvat ið skal speglast: Hvørjir eru teir bólkar, sum hava krav upp á umboð?

Tey, ið hella til hitt grundarlagið fyri politiskari umboðan, *virtual representation*, halda uppá, at tað ber til at umboða í fluttari merking. Summi siga t.d., at menn ofta umboða áhugamálini hjá kvinnum betri enn kvinnurnar sjálvar. Men munu ikki slíkir pástandir mangan skava út yvir politiskar mótsetningar og manglandi umboðan fyri summar bólkar? Hvussu hevði tað samsvara við vanliga hugsan hjá fólki, um vit søgdu, at havnarfólk væl kunnu umboða áhugamálini hjá útjaðaranum, tí tey hava ofta verið og ferðast á bygd? Kunnu gamlir tingmenn umboða ungdómin, tí teir einaferð hava verið ungir?

Tað er sera týdningarmikið, at fólk hava álit á fólkaræðinum. Tí mugu vit hava eina skipan fyri vali av umboðum, har flest øll kenna, at tey hava ávirkan, at teirra virði, hugsanir og áhugamál verða umboðað av teimum fólkavaldu. Hetta er ikki bara spurningur um matematikk, at umleið sama tal av atkvøðum er aftan fyri hvønn tinglimin. Tað er serliga ein spurningur um, hvørji valevni veljarin hevur at velja ímillum, og hvønn møguleika veljarin sær fyri at ávirka valið, so at tey, sum verða hildin at vera fræg umboð, koma inn á ting.

Fólk flest hava eina greiða fatan av, hvat tey ymisku valevnini standa fyri. Flokksskráirnar geva nokkso greiða ábending um hugsjónir um loysing ella samband, og um økonomiska stýringin eigur at vera vinstra- ella høgravend. Tað eru eisini flokkar, sum melda út um religiøsa hugsan. Har afturat vita veljararnir, ella halda seg vita, støðutakanina hjá tí einstaka valevninum: Summi hava sitið á tingið fyrr, og tá víst hvussu djúpt flokksskráin stingur. Tað kann t.d. koma fram í støðutakan til yvirtøkur. Slíkt sæst eisini aftur í støðutakan til búskaparpolitiskar spurningar, t.d. um Løgtingið skal stuðla teimum veiku í samfelagnum gjøgnum ein fordeilingspolitikk, ella heldur royna at stimbra privata vinnulívinum, og tann vegin kanska seta ferð á búskapin. Fólk vita eisini, hvørji valevni, sum eru í brøðrasamkomuni og hvørji eru heimamissiónsfólk, hóast tey standa á listum saman við fólkum, sum sjáldan fara í kirkju. Og so er tað *slagið*: Tað er óivað stórur loyalitetur í summum familjum til ein flokk. Hin vegin kann tað hugsast at eitt valevni, sum kanska ikki umboðar allar tær hugsanir, sum fólk flest forvænta av teimum í tí familjuni, kann hava trupult við at fáa sín boðskap fram í einum politiskum kjaki. Fólk hoyra tað, tey vænta at hoyra.

Tað eru djúp gil millum bólkar í føroyska samfelagnum. Kanska summi gil eru vorðin léttari at fara yvir um seinastu árini, kanska tað eru vorðið einfaldari at vera politiskt umboð fyri fleiri bólkar í senn. Men samanum tikið kunnu vit vísa á umleið somu spenningar í føroyska samfelagnum, sum vit m.a. finna í tí norska. Og hugsandi er, at hetta sæst aftur í, hvørji umboð, sum verða vald á ting:

- *Geografi:* Lokalpatriotisman er sterk. Hvør vil hava umboð fyri sína bygd.
- *Religón:* Kirkjufólk mótvegis heimamissión mótvegis brøðrasamkomu mótvegis ...
- *Klassi, Starvsbólkar:* Kanska hetta gevur ymisk útslag? Velja arbeiðsfólk fakfelagsumboð, ella kanska heldur umboð fyri arbeiðsgevarar, sum tey vóna vilja tryggja teimum arbeiði framyvir?

Hvat við *kyni?* Jú, óiva hevur kyn stóran týdning. Tað sær út til, at menn vilja hava menn í politisk álitisstørv. Løgmaður og flokksformenn funnu bara menn til landsstýrið og formanssessirnar í ár. Kanning frá kommunuvalinum í Havn í 2000 vísti, at kvinnur sum heild velja bæði menn og kvinnur - menn sum heild velja menn:

*Talva: Atkvøða menn og kvinnur fyri monnum ella kvinnum?*

| | Menn | Kvinnur | Í alt |
|---|---|---|---|
| Valdu ein mann | 80,3 | 56,3 | 67,9 |
| Valdu eina kvinnu | 16,0 | 41,2 | 29,0 |
| Valdu flokkin | 3,7 | 2,5 | 3,1 |
| Í alt | 100,0 | 100,0 | 100,0 |
| N*= | 2402 | 2560 | 4962 |

* N = 52,8 % av veljarunum.
Til kommunuvalið í Tórshavnar kommunu 2000 høvdu til saman 12.571 veljarar atkvøðurætt; av teimum greiddu 9398 atkvøðu, v.ø.o, valluttøkan var 74,8 %

Vánaliga umboðanin av kvinnum hevur skapt rumbul. Í kjakinum um hvat kann gerast fyri at fáa fleiri kvinnur inn í Løgting og bý- og bygdaráð, er m.a. komið uppskot um at kvinnur skulu hava minst 25 ella 30 % av sessunum á tingi (Sosialurin, 24.4.04). Vanligt er annars, at málið er í minsta lagi 40 % umboðan av hvørjum kyni. So er spurningurin, um tað skal vera upp til veljaran, flokkin ella um tað skal vera lógarfest, at eitt minsta mark kann vera fyri, hvussu býti er millum kvinnur og menn.

Hvørji mál munu hava størst týdning fyri veljaran? Man tað vera av eins stórum týdningi at hava kvinnuumboð sum at hava umboð fyri sína bygd á tingi ella í býráðnum? Við seinasta val gekk talið á kvinnum í býráðnum í Havn aftur, men kollfirðingar fingu so sítt umboð aftan á samanleggingina. Hvussu munu samanleggingar av kommunum fara at ávirka kynsbýtið í bý- og bygdaráðum um landið aftan á valið til heystar?

Kappingin um at fáa politiskt álitisstarv velst millum annað um hvussu nógv, sum skulu veljast. Fólkatalið er nógv vaksið, bæði um landið og í høvuðsstaðnum, uttan at talið á løgtings- og býráðssessum er økt tilsvarandi. Kanning, sum eg havi gjørt av býráðsvalum í Havn, vísti bardaga um sessirnar, og at tað ofta vóru teir somu, sum vórðu afturvaldir. Og ein orsøk liggur í skipanini: at hvør veljari bert hevur ein kross at seta við eitt valevni. Hvør skal fáa tann krossin? Skal tað vera tann, sum veljarin metir vera frægasta umboð? Ella skal man heldur velja tann, sum man metir má sikrast sess fyri at sleppa undan, at ein persónur, sum man metir vera púra hopleysan, skal koma inn? Og hvat er mest strategiska atkvøðugreiðslan, tá valevnini eru spjadd á nógvar listar? Hvar ger *mín* atkvøða størst nyttu í mun til umboðan av mínum áhugamálum?

Ein máti at tryggja kvinnum umboðan, er at fara aftur til eina skipan, har *flokkurin* raðfestir, hvørji ið skulu standa ovast á listanum, og veljarin bert setur kross fyri listan. Ein annar máti at gera tað "léttari" at atkvøða fyri kvinnum, er at geva hvørjum veljara *fleiri* atkvøður, sum so fara til tey valevnini, sum veljarin raðfestir hægst. - Annars ber til at hækka talið á fólkavaldum. Royndir aðrastaðni hava víst, at tá verður ofta pláss fyri fleiri kvinnum. Helst var ein grund til, at tær fyrstu kvinnurnar vórðu valdar til Løgtingið í 1978, at talið á løgtingslimum hækkaði, og serliga at Suðurstreymoyar valdømi fekk tvífaldað sína umboðan úr 4 upp í 8. - Verða uppskot til broytingar av valskipanini gjørdar við grundarlagi í teoretiskum og empiriskum royndum frá altjóða valgransking, og við kunnleika um royndir frá føroyskum valskipanum, ber til at finna góðar loysnir.

Tey dømi, sum her er víst til um ójavna og kanska skeiva rekruttering til Løgting og bý- og bygdaráð, snúgva seg øll um býti millum kvinnur og menn. Orsøkin er veikt empiriskt grundarlag fyri føroyskari valgransking. Einasta, vit hava at fara eftir, er um valevnið hevur konufólka- ella mannfólkanavn. Tað hevði bøtt munandi, um vit høvdu vitað p-talið hjá teimum, sum stilla upp. Tá høvdu vit kunna kannað aldursbýtið á valevnum og valdum, og eisini við størri vissu kunna sagt nakað um afturval. Vónandi fara føroyskir landsmyndugleikar at skipa fyri slíkari skráseting.

Meðan vit bíða eftir betri hagtølum, mugu vit fáa fatur á tølum á annan hátt. Í næstum fara øll valevni, sum stillaðu upp til kommunuvalið í 2000, at fáa eitt spurnarblað í postinum. Henda kanning er ætlað at lýsa nakrar av spurningunum um rekruttering av politikarum. Eg vóni, at fólk gera sær tann ómak at fylla spurnarblaðið út, og senda tað aftur til mín.

Valgransking gevur kunnleika um, hvussu politiska skipanin fungerar. Hetta átti at havt politiskan áhuga. Tað er ein ábyrgd, sum hvílir á okkum øllum, og serliga teimum fólkavaldu, at tað ikki er ein hópur av kvinnum, ungum, tilflytarum og øðrum, sum missa álitið á politisku skipanini, tí tey ikki virða tey fólkavaldu sum legitim umboð fyri seg og síni.

Fólkaræðið má røkjast og verjast fyri at yvirliva.



*Keldur:*
*Christophersen, J.A. (1963/64):"Representant og velger", Tidsskrift for Samfunnsforskning nr. 4 1963 og nr. 2, 1964.*
*Jákupsstovu, Beinta í (1996): "Kvinner ingen adgang?". Norsk Statsvitenskapelig Tidsskrift 1996:1.*
*Phillips, Anne (1995): The Politics of Presence. Oxford*
*Rokkan, Stein (1967/1987): "Geografi, religion og samfunnsklasse", í Stat, nasjon, klasse, Universitetsforlaget*